Dreingir og gentur í starvsvenjing:

# Tíma ikki tað sama

**Úti regnar og kaldi vindurin ýlur, sum var hann vilstur av kós. Nú er heystið farið aftur um bak og veturin nærkast við stórum fetum. Hetta er eisini tíðin tá ið næmingar í fólkaskúlanum royna seg á arbeiðsmarknaðinum**

STARVSVENJING
*Annika S. Biskopstø*
*Starvsnæmingur*

Solsialurin hevur gjørt av at hitta Elisu Waag skúlavegleiðara í Klaksvík, sum í løtuni hevur 52 næmingar í starvsvenjing kring landið.

Klokkan var farið av 5 og myrkrið var komið oman av Kjølinum tá eg stóð uttan fyri húsini hjá Elisu. Tað er aftaná arbeiðstíð, men tað bilar ikki hjá Sosialinum og hjá hesum lærara, sum dagliga starvast í Skúlanum á Ziskatrøð. Eg verði bjóðað inn í eina hugnaliga stovu og Elisa svarar mær soleiðis:

- Eg haldi at tað er stór vælvild frá arbeiðsplássunum at tey vilja taka ímóti starvsnæmingum. Tað kann krevja nógva tíð og orku og sjálvandi er tað eisini ein ábyrgd sum fylgir við. Ofta er tað soleiðis, at næmingurin noyðist at hava ein vaksnan at leiðbeina seg í arbeiðinum og at taka sær av einum teir fyrstu dagarnar. Tað eru ikki øll arbeiðspláss sum hava møguleika til hetta, sigur Elisa Waag og leggur afturat.

- Hinvegin skulu vit minnast til, at arbeiðsplássini seinni kunnu fáa brúk fyri hesi arbeiðsmegini. Tískil er tað umráðandi at vinnulívið og fólkaskúlin samstarva á hendan hátt.

- Er tað ringt at finna arbeiðspláss til næmingar sum skulu í starvsvenjing?

- Ja, tað kann vera ringt. Tað er soleiðis at hvør næmingur hevur møguleika at velja trý starvsøkir ella arbeiðspláss. Og tað kemur meiri enn so fyri, at onki av valdu arbeiðsplássum kunnu taka næmingar. Eisini hendir tað seg, at fleiri næmingar ynskja sama stað. Tá verða vit noydd at taka lut um hvør skal hvar.

- Velja gentir og dreingir ymiskt?

- Tað vil so vera, hóast undantøk eru. Gentir velja vanliga frisørstovur, barnagarð, handlar og meira fittlig arbeiðspláss. Dreingirnir fara ofta á bilverkstøð, til skips, á heilsølur, í smiðjur, royna telduverðina og annað tøkniligt arbeiði.

– Hvat krevja arbeiðsplássini av næmingunum?

– Tey seta ikki beinleiðis krøv. Men nógvastaðni eru stór trygdar- og heilsukrøv og onnur fyrilit sum skulu takast. Tískil er tað eisini gott at skúlin veitir neyðugar tryggingar.

– Hvat heldur tú at næmingar læra við at fara tvær vikur í starvsvenjing?

– Fyrst og fremst haldi eg, at hvør næmingur fær ein lítlan smakk av hvat tað er at skula upp til arbeiðis. Og við at tosa sínamillum læra næmingarnir eisini, at arbeiðspláss eru ymisk og at tvær vikur í starvsvenjing kunnu vera gevandi á ymsan hátt.

– Um tú vart praktikantur. Hvar hevði tú so farið?

– Okkurt kreativt, haldi eg. Pav ella Sirri. Møguliga í ein blómuhandil, endar Elisa Waag við einum smíli.



*–Tað er umráðandi at skúlin og vinnulívið samstarva um at fáa ungfólk í starvsvenjing. Hetta kemur í seinasta enda øllum samfelagnum til góðar.*



*Hanni Niclasen, Pomek*

Eg havi áhugað fyri maskinum, so eg trívist væl í hesum ganginum. Sum starvsnæmingur sleppi eg ikki at gera alt sum mær lystir, men eg havi gjørt stokkar til stampar, eisini havi eg sveisað eitt sindur. Mær dámar best arbeiði á landið og tað bilar onki um ein sleppur at arbeiða í yvirtíð, sigur Hanni avgjørdur á málið.



*Rasmus Jacobsen, bil og dekkverkstaðið hjá John Heinesen*

Eg slapp á tað arbeiðsplássi eg hevði ovast á listanum. Eg haldi at arbeiðsdagurin er góður. Ikki minst tí, at man sleppur at vera uppí øllum.

Hesa tíðina eru tað nógv dekk sum skulu skiftast, eisini skulu bilar hava nýggja olju sigur Rasmus, sum eisini hevur arbeitt við skutarum.

Eg kundi seinni í lívinum gott hugsað mær at verið bilmekanikari. Annars er ein annar møguleiki eisini at fara til skips.

*Maria Brim, á Klaksvíkar Bókasavnið*



Eg slapp á tað arbeiðsplássið sum eg ynskti.

Arbeiðið er spennandi, men samstundis eitt sindur torført og strævið.

Tað er nógv at gera og at halda skil á. Ikki minst við øllum skrásetingum av bókum. Ein skal duga væl á telduni.

Sjálv havi eg arbeitt við jólabókum. Annars er tað helst soleiðis, at arbeiðið á bókasavninunum ikki virkar so krevjandi, men tað er tað.

Maria heldur annars at eitt gott arbeiði, er eitt stað har tú fært góða løn.



*Elsa Maria Andreasen og Berit Mohr, Blómuhandilin Flora*

Vit sloppu har vit ynsktu. Báðar hava áhugað fyri handaligum arbeiði, so tað kom okkum væl við. Vit hava gørt forlornar urtapottar, gravpynt, prísað, støvsúgvað og ymiskt annað, ið hoyir við til arbeiðsdagin í einum blómuhandli. Um hesa tíðina byrja handlarnir eisini so at smátt at pynta til jóla og tað hava vit báðar Berit og Elsa Maria eisini tikið lut í.

*Jancy Poulsen, Mylnuhúsið*

Mær dámar væl at arbeiða á hesum stovninum, sum hevur børn ið eru undir skúlaaldur. Og tað sást beinanvegin at Jancy er væl umtókt í barnagarðinum. Børnini flokkaðust um hana og starvnæmingurin hevði úr at gera.

- Eg haldi virkuliga at tað krevst gott tol at arbeiða við børnum í hesum aldursbólkið. Vit spæla ymisk spøl og børnini fáa ongantíð nokk.





# Løgmaður vísir málið frá sær

**Løgmaður fer ikki at taka málið um uppsagda fulltrúan í Fiskimálaráðnum upp fyribils. Hann hevur fult álit á, at Fiskimálaráðið hevur hildið seg til reglurnar, tí tað hevur verið í samband við lønardeildina, sum hevur starvsfólkamál um hendi**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Eg haldi ikki, at talan er um brot á nakrar rættarreglur og starvsfólkapolitikk, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Sostatt gongur hann beint ímóti mótmælunum frá Búskapar- og løgfrøðingafelagnum, Starvsmannafelagnum, Magistarafelagnum og Verkfrøðingafelagnum, sum harðliga hava átalað mannagongdina, nú ein fulltrúi er uppsagdur í Fiskimálaráðnum.

– Eg havi sjálvandi kekkað málið, nú tað kom fram, og eg síggi onga orsøk til at fara inn í málið, tí landsstýrismaðurin hevur brúkt almenna uppsagnarpolitikkin. Eg dugi ikki at síggja nøkur brot, sigur Anfinn Kallsberg, sum kortini viðgongur, at hann ikki hevur sæð hoyringsskrivið.

Hann fær ikki hildið seg til mótmælið frá fakfeløgunum, tí tey eru ikki ítøkilig, men hann vísir á, at uppsøgnin er gjørd í samráð við lønardeildina, sum situr við starvsfólkamálum, og tí hevur hann fult álit á, at alt er farið fram sambært lógum og reglum.

Fakfeløgini geva ábendingar um, at fulltrúin er gjørdur til syndabukk, tí Fiskimálaráðið er átalað av løgtingsins umboðsmanni.

Løgmaður sigur, at hann ikki vil gera viðmerkingar til persónsmál, men vísir á, at uppsøgnin er grundað á niðurstøðuna hjá løgtingsins umboðsmanni.

# Horvni fulltrúin hóttir

**Uppsøgnin av fulltrúanum í Fiskimálaráðnum kann gerast ein trupulleiki hjá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum. Fakfeløg siga, at rættarreglur og sáttmáli eru brotin, og ein landsstýrismaður hevur áður rokið fyri minni. Enn hevur fulltrúin kortini ikki gjørt av, um hann ger meira við málið, og uttan hann fara fakfeløgini ikki víðari**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*

Øll tosa um fulltrúan. Men fulltrúin tosar ikki við nakran.

Í løtuni verður bíðað eftir, hvat uppsagdi fulltrúin á Fiskimálaráðnum ætlar sær at gera. Hann hevur fingið at vita, at hann verður uppsagdur, tí Løgtingsins umboðsmaður hevur átalað viðurskifti á Fiskimálaráðnum. Hann umhugsar støðuna, og tí er enn ikki greitt, um talan verður um eitt mál, ið verður reist ímóti Fiskimálaráðnum.

Ábendingar eru um, at farið er lætt um fleiri reglur og mannagongdir, tá hann varð sagdur úr starvi. Tað siga í øllum førum fýra fakfeløg, sum hava sett seg inn í málið. Grov brot eru framd á galdandi rættarreglur, sáttmála og almenna uppsagnarpolitikkin, siga fakfeløgini, sum meta hesi brotini vera nógv grovari enn málið, ið førdi til átaluna frá løgtingsins umboðsmanni.

Tað eru álvarsligar ákærur, sum kunnu fáa fylgjur fyri landsstýrismannin, ið segði fulltrúan úr starvi, um tær eru rættar.

### Eitt álvarsmál

Ein landsstýrismaður er áður uppsagdur av løgmanni, tí hann breyt almenna starvsfólkapoltikkinum. Annlis Bjarkhamar mátti fara frá sum landsstýriskvinna við mentamálum, tí ivi var um, hvørt hon hevði fylgt landsins starvsfólkapolitikki. Tað málið er til viðgerðar hjá løgtingsins umboðsmanni, so enn er ikki greiða fingin á, um hon gjørdi nakað galið.

Niels Winther, formaður í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum, veit væl, at starvsfólkamál áður hava fingið avleiðingar, tí starvsfólkapolitikkurin hevur livið í klemmu, men hann heldur hetta málið vera uppaftur álvarsligari.

– Starvsfólkapolitikkurin er bara ein vegleiðing. Í hesum føri er talan um brot á galdandi rættarreglur og sáttmála, og tað er meira álvarsligt, enn tá starvsfólkapolitikkurin er brotin. Eg fái ikki sagt so nógv um málið enn, tí fulltrúin hevur ikki gjørt av, hvat hann vil, men vit hava kortini valt at gjørt vart við okkum, tí so nógv prinsipp eru brotin, sigur Niels Winther.



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, er aftur miðdepiling í einum rumbulsmáli. Fakfeløgini siga hann hava brotið rættarreglur og sáttmála í uppsøgnini, men løgmaður verjir hann og sigur hann hava hildið almenna uppsagnarpolitikkin*

*MYND: Jens K. Vang*

### Kanska offraður

Búskapar- og løgfrøðingafelagið, Starvsmannafelagið, Magistarafelagið og Verkfrøðingafelagið átala øll harðliga, at ein einstakur fulltrúi uttan leiðsluábyrgd verður sagdur úr starvi sum avleiðing av øllum teimum átalum, sum Fiskimálaráðið hevur fingið. Tað stendur millum reglurnar, at fulltrúin er offraður, tí løgtingsins umboðsmaður í fleiri førum hevur funnist at umsitingini hjá Fiskimálaráðnum.

Í ítøkiliga førinum er talan um eina umbøn um alment innlit, sum ikki er svarað. Men maðurin hevur eftir øllum at døma ikki áður fingið eina ávaring. Hann gerst liður í einari upprudding, sum enn ikki hevur nakað ávíst mið ella mál.

Harafturat er síðan komið fram, at uppsøgnin skal vera grundað á persónlig viðurskifti. Sosialurin skilur, at einki stendur um tað í fyribils hoyringsskrivinum, sum maðurin hevur fingið, og sostatt er navnið á viðkomandi fulltrúa dálkað óneyðugt.

– Tað er tilvildarliga hesin maðurin, sum stendur fyri skotum, og tað mugu vit átala. Um vit gera meira við málið, veldst um, hvat maðurin sjálvur vil, sigur Niels Winther, formaður í BLF.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa viðmerkingar frá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, til tað, sum fakfeløgini føra fram.

## Umboðsmaðurin feldi fulltrúan

**Niðurstøðan hjá umboðsmanninum er einasta grundin til, at ein fulltrúi varð sagdur úr starvi í Fiskimálaráðnum. Sostatt eru leysasøgurnar um, at tað eisini eru persónlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, gjørd til skammar**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er eina og aleina niðurstøðan hjá Løgtingsins umboðsmanni, ið liggur til grund fyri, at ein fulltrúi er uppsagdur í Fiskimálaráðnum.

Tað gongur fram av brævi, sum Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, tann 31. oktober sendi Kaj P. Mortensen, aðalstjóra í Fiskimálaráðnum. Sosialurin hevur fingið innlit í brævið.

Víst verður til niðurstøðuna hjá Umboðsmanninum, sum gav Fiskimálaráðnum eina átalu fyri, at álvarsligt brot varð framt á lóggávuna, tá ein blaðmaður søkti um alment innlit.

Í brævinum til aðalstjóran sigur Jacob Vestergaard, at hann metir niðurstøðuna at vera »sera álvarsliga«, og kann hann tí »als ikki góðtaka handfaringina av hesum máli«. Hann sigur seg »hava mist álit á saksviðgerðan«, sum tí ikki eigur at halda fram í starvi hjá Fiskimálaráðnum og »eigur hetta at vera honum gjørt greitt beinanvegin«.

Sostatt er púra greitt, at tað er niðurstøðan hjá Umboðsmanninum, sum er atvoldin til, at fulltrúin er uppsagdur. Tað hevur verið róð framundir, at tað eisini eru persónlig viðurskifti, sum liggja til grund, men sambært hesum brævinum, har ordrin til uppsøgnina verður givin, er tað ítøkiliga málið, sum var nóg mikið, til at fulltrúin varð uppsagdur. Tað heldur Búskapar- og løgfrøðingafelagið verða í so hart.